LM-099/2023

Fylgiskjal 61

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn

Signabøur, 21.02.2024

Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu – mál nr. 23/25395

Endamálsorðingin lýst í §1. Stk. 1 í hesi lóg er góð, men við hesum lógaruppskoti, ber ikki til at halda endamálsorðingina.

Annars hava vit hesar viðmerkingar.

§ 2. stk. 7, festari ella leigari eru ikki brúkarar, men festarar og leigarar.

§ 3. Tað er ov víðgongt at siga, at tað eru einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini, sjálvt um tað verður víst til avmarkingar og skyldur í lógini.

§ 4. stk. 1, 2 og 5. Hvør kemur at meta um ampan av ferðandi? Yvir fyri hvørjum skal bóndin bera prógbyrðu um, at onkur er til ampa? Um boð til ferðandi ikki verða fylgd?

§ 5. Stk. 2. Má strikast saman við § 12, sum víst verður til í hesum stykki. Handilslig ferðavinna, hjá øðrum enn avvarðandi av haganum, má í øllum førum gerast í samráð við bóndan og ongantíð koma fram um landbúnaðarvirksemi.

§ 6. Hetta verður eitt stórt tak hjá kommununum. Tað verður ein løta hjá okkara kommunu at koma runt til allar hagarnar í kommununi. Eru kommunurnar eftirspurdar?

Almennar farleiðir eru í dag vegir, har bilar og bussar kunnu koyra. Gomlu bygdargoturnar hava ikki verið almenn farleið í minst 75 ár og eru tí heldur ikki hildnar við líka. Fleiri av teimum eru heldur ikki egnaðar sum farleið longur. Hetta má hædd takast fyri.

§ 7. Verður tað aktuelt, at kommunurnar fara at gera ferðavinnuætlan fyri hagarnar, so er avgjørt neyðugt, at eigarar og festarar eru við í nevndunum, sum gera hesar ætlanir fyri hvørja bygd sær, ikki bara fyri hvørja kommunu.

§ 8. Avgerandi er, at eigari ella festari góðkenna um og hvussu hesar gotur verða gjørdar.

§ 10. Festarar mugu eisini fáa endurgjald, um tað skuldi komið har til, at øki verður tikið til handilsliga ferðavinnu og avtikið sum landbúnaðaroki, og festarans egna inntøkugrundarlag harvið versnar.

§ 11. Øki, har vandamikið er at ferðast, eiga at verða stongd fyri fólki, sum ikki hava við beinleiðis raksturin av haganum at gera. Í minsta lagi mugu avvarðandi av haganum góðkenna staðkendu fólkini.

§ 12. Eigarar og festarar mugu kunna gera av, hvar og hvussu nógv fólk fáa atgongd til hagan. Tí eigur hetta at verða strikað. Vit mugu kunna hava ross og neyt á beiti í haganum, tað er tað, sum gevur okkum og tykkum ollum mat á borðið og upplivingar at koma til. Tí mugu øki vera, sum verða stongd av so ella so. Tá vit skulu á fjall, skulu vit fyrst hugsað um, at veðrið verður til vildar, harafturat at vit hava nokk av fjallfólki, um vit nú eisini skulu boða frá ella spyrja almenningin um loyvi til at

avmarkað gongurættin, teir dagarnar vit ætla okkum á fjall, verður enn truplari ella heilt ógjørligt at røkta haga og húsdjór.

§ 14. Við ætlaða gjaldinum, verður parturin til kommunu bert at røkka til eitt hálvt starv til at umsita hesa lóg, og tískil verður onki til gøtur o.a. Restin av gjaldinum verður eisini so lítið, at tað ikki fer at muna, hvørki hjá bygd ella haga.

§ 15. Hvørji eru boðini ella avleiðingarnar fyri tey ferðandi, sum ikki halda lógina? Her verður hugsað um ferðasmiðir, ferðaleiðarar og gongufólk sum heild.

§ 17. Hendan lógin kann ikki koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, tí tað eru so nógvar kunngerðir og ætlanir, sum mugu gerast áðrenn. Verður tíð ikki sett av til hetta arbeiðið, verður enn meira óskil, enn tað er í dag.

Stk. 2. Hetta má strikast. Hendan lógin, vit nú viðgera, má laga seg til galdandi lóg, til tær hava fingið eina viðgerð og tá møguliga kunnu broytast. Øll rættindi, sum nevnd verða í endamálsorðingini, verða tikin av, um hesar § verða strikaðar. Festarar missa lunnindi og annað tilfeingið og fáa harvið ikki vart náttúruna ella varðveitt og styrkt um mentanina og mentanararvin, sum ofta er stórur á bóndagørðum. Verða bara fremmandir ferðaleiðarar, kunnu teir siga onkra søgu. Verður staðkendur ferðaleiðari brúktur, verður mentanin og mentanararvurin á staðnum varðveittur og borðin víðari.

Viðmerkingar annars: innangarðs er nógv tikið frá landbúnaðinum, serliga til bygging o. líkn. Í flestu støðum eru øll húsdjór víst út um bøgarðarnar, tí tey larma og dálka ov illa. Ivasamt er tí, um tað fer at vera møguligt at hava onnur húsdjór enn seyð, verður hendan lógin sett í gildi. Endamálsorðingin í lógini verður trupul at halda.

Nógv hevur verið tosað um haruskjóting í samband við viðgerð av hesum lógaruppskoti. Tá haruhagar verða seldir, er tað bara rætturin til at fara í hagan at skjóta, sum verður seldur, ongin onnur tænasta. Tí átti tað ikki at verið nakað í vegin fyri, at tey, sum umsita hagarnar, eisini fáa part av inntøkunum, sum onnur hava í teirra haga og avgera, hvør tað er.

Onki er nevnt í hesum uppskotið, hvussu sjóokið skal skipast í ferðavinnuhopi. Er tað ikki eins týdningarmikið, at ferðandi og fremmandir ferðasmiðir verða upplýst um tað, tá tey koma til landið? Har er eisini nógv ferðavinna.

Víst verður annars til viðmerkingarnar frá Bóndafelag Foroya, sum er okkara fakfelag.

Vegna Signabøgarð

Dorthea Joensen og Jenus í Troðini